LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

100 Tórshavn

25. februar 2014
Mál: 0613-001/14-14
Lógatænastan
Viðgjørt: NF

Løgtingsmál nr. 114/2013: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Ítróttavedding (Eydnuspæl o.a.)

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ítróttavedding
(Eydnuspæl o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 51 frá 17. mai 2011 um ítróttavedding verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, stk. 1 verður sum 2. pkt. sett: "Sp/f Ítrottavedding kann eisini fáa loyvi at skipa fyri eydnuspølum, so sum happadrátti, tá hesi ikki kunnu loyvast eftir aðrari løgtingslóg."

2) Yvirskriftin til kapittul 3 verður orðað soleiðis: "**Avtalur við veddingar- og eydnuspælsfeløg"**

3) Í § 4, stk. 1, 1. pkt. og § 4, stk. 2, 1. pkt. verður "veddingarfelag" broytt til: "veddingar- og eydnuspælsfelag "

4) Í § 4, stk. 1, nr. 2 verður "Veddingarfelagið" broytt til: "Felagið"

5) Í § 4, stk. 2, 2. pkt. og § 4, stk. 3, 2. pkt. verður "veddingarfelagið" broytt til: "felagið"

6) Í § 4, stk. 3, 1. pkt. verður "veddingarfelag" broytt til: "felag"

7) Í § 4 verður sum stk. 4 sett: "*Stk. 4.* Sp/f Ítróttavedding kann taka gjald fyri at gera avtalu og eitt árligt loyvisgjald."

8) Í § 6, stk. 1 verður "spølum" broytt til: "eydnuspæli og happadrátti o.líkn."

9) Í § 6 verður sum stk. 2 sett: "*Stk. 2.* Fyri veddingarspøl, kasinospøl o.líkn. á netinum verður goldið 15% av bruttospæliinntøkuni hjá felagnum fyri spæl í Føroyum. Bruttospæliinntøkan er tað, sum loypur av, tá útgoldnu vinningarnir eru farnir av tí, sum samlað er komið inn av spælipeningi."

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Eydnuspælsfeløg, ið virka í Føroyum, tá henda løgtingslóg kemur í gildi, og sum ikki hava loyvi eftir aðrari løgtinglóg, skulu seinast tann 31. desember 2014 hava gjørt avtalu við Sp/f Ítróttavedding, um tey framhaldandi ætla at virka í Føroyum.

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

1. Orsøk til lógaruppskotið

Lógin um ítróttavedding er skjótt 3 ára gomul. Lógin hevur virkað eftir ætlan, tó hevur tað víst seg at vera tørvur á at dagføra og nágreina nakrar ásetingar í lógini.

Dagføringarnar fevna um:

1) at áseta reglur um, at Sp/f Ítróttavedding eisini kann gera avtalur við útlendsk spælifeløg um eydnuspæl, so sum happadrátt, klassalottarí o. líkn.,
2) at áseta reglur um avgjald av bruttospæliinntøkuni av spølum, og
3) at staðfesta rættin hjá Sp/f Ítróttavedding at taka gjald og árligt loyvisgjald, tá avtalur verða gjørdar millum Sp/f Ítróttavedding og veddingar- og eydnuspælsfeløg.

Sp/f Ítróttavedding er felag hjá landsstýrinum, Ítróttasambandi Føroya (ÍSF) og Føroya Ungdómsráð (FUR). Landsstýrið eigur 20% av samlaða innskotspeninginum, ÍSF eigur 50% og FUR 30%.

2. Endamálið við lógaruppskotinum

Reglur um, at Sp/f Ítróttavedding eisini kann gera avtalur við útlendsk spælifeløg um eydnuspæl, so sum happadrátt, klassalottarí o. líkn.

Í samband við, at Ítróttavedding ætlaði at gera eina avtalu við spælifelagið Det Danske Klasselotteri, vóru vit varug við, at lógin ikki heimilar Ítróttavedding at gera avtalur við útlendsk feløg um eydnuspæl, so sum happadrátt, klassalottarí o. líkn., hóast hetta upprunaliga var ætlanin. Hetta kemst av, at tá lógin varð gjørd, hava vit ikki gáað um, at eydnuspæl, so sum happadráttur og klassalottarí neyvan er fevnd av orðingini í lógini "veddingar, talspøl og netspøl", ið eru tey spøl, ið Ítróttavedding hevur heimild at gera avtalur um.

Í dag er tí ongin heimild at loyva hesum spølum í Føroyum. Ítróttavedding hevur frammanundan heimild at gera avtalur við útlendsk veddingarfeløg um onnur spøl, og tað er tí væl hóskandi eisini at loyva Ítróttavedding at gera avtalur við útlendsk spælifeløg um eydnuspøl so sum happadrátt og klassalottarí. Avlopið av hesum spølum fer tá eisini til almannagagnlig endamál í Føroyum.

Eyðkenni fyri veddingar, talspøl og netspøl (hasardspøl) o.líkn. er, at úrslitið er tilvildarligt og ikki til at rokna út frammanundan og er ikki tengt at dugnaskapi og royndum hjá einum spælara. Ofta er talan um skjót spøl, har vinningur ella tap verður staðfest næstan beinanvegin. Talan er ofta um spæl við stórum peningaumsetningi.

Eyðkenni fyri eydnuspæl, herundir happadrátt, er, at ein vinningur verður drigin fyri hvørt spælið, og at tað tí altíð er ein vinningur aftaná hvørt spæl, men tað er tilvildarligt og óvist, hvør tað er, sum fær vinningin.

Reglur um avgjald av bruttospæliinntøkuni viðv. veddingarspølum og kasinospølum o.líkn. á netinum

Í dag skal gjaldast eitt avgjald til Ítróttavedding á 15% av øllum vinningum oman fyri 200 kr.

Í løgtingslóg nr. 99 frá 29. desember 1998 um gjald av vinningi við burturluting v.m. er í § 1, stk. 3 ásett at rindast skal eitt gjald, sum er 15% av tí parti av vinninginum, sum er oman fyri 3.000,00 kr. Samstundis, sum løgtingslóg um ítróttavedding var samtykt í Løgtinginum í 2011, varð eisini gjørd ein broyting í § 12, stk. 2 í løgtingslóg um gjald av vinningi við burturluting v.m. soleiðis, at tað var ásett, at avgjald av vinningi av spæli í Føroyum, har loyvi er givið við heimild í løgtingslóg um ítróttavedding, verður roknað eftir reglunum í løgtingslóg um ítróttavedding. Sambært § 6 í løgtingslóg um ítróttavedding er avgjaldið ásett at vera 15% av øllum vinningum oman fyri 200 kr.

Í veddingarspølum sum t.d. poker og roulette verður í sama spæli vunnið ella tapt fleiri ferð, tí hvørt einstakt spæl er sera stutt. Um fólk t.d. spæla 1 spæl av poker í 1 tíma, so inniheldur hetta spælið eina rúgvu av part-spølum, har annaðhvørt verður vunnið ella tapt. Eftir ásetingini í dag, so skal avgjald gjaldast av hvørjum av hesum part-spølum, um vinningurin er oman fyri 200 kr. Hetta letur seg í royndum ikki gera, og tí verður skotið upp, at fyri hesi spølini eigur í staðin at verða kravt eitt avgjald, sum er 15% av bruttospæliinntøkuni hjá veddingarfelagnum.

Bruttospæliinntøkan er tað, sum loypur av, tá útgoldnu vinningarnar eru farnir av tí, sum samlað er komið inn av spælipeningi.

Gjald, tá avtalur verða gjørdar millum Sp/f Ítróttavedding og útlendsk veddingar- og spælifeløg

Tá Ítróttavedding ger avtalur við veddingarfeløg verður kravt eitt gjald fyri at sleppa á føroyska marknaðin, eitt sokallað "signing fee" gjald umframt eitt leypandi árligt loyvisgjald. Hetta er óbeinleiðis heimilað við, at Ítróttavedding er heimilað at gera avtalur við veddingarfyritøkur. Tað verður mett at vera rættast at staðfesta hesa heimild beinleiðis í lógini. Sama verður galdandi fyri avtalur, sum verða gjørdar við eydnuspælsfeløg.

3. Galdandi lóggáva

Lóggavan, sum skipar spæl í Føroyum, er løgtingslóg nr. 51 frá 17. mai 2011 um ítróttavedding. Sambært hesi lógini hevur Sp/f Ítróttavedding loyvi til at skipa fyri spølum, so sum vedding, talspøl og netspøl. Eisini kann Ítróttavedding gera avtalu við útlendsk veddingarfeløg um at bjóða út spøl í Føroyum. Avtala er gjørd við P/F Danske Spil.

Eisini er løgtingslóg nr. 53 frá 7. mai 1987 um eydnuspæl, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 37 frá 28. apríl 2009. Í lógini er ásett, at tað bert er loyvt at skipa fyri eydnuspæli í Føroyum, um loyvi frammanundan er fingið frá landsstýrinum til tess. Landsstýrið hevur í

kunngerð nr. 163 frá 18. desember 2013 lagt umsitingina av eydnuspølum til TAKS, tó ikki avgerðarrætt og fráboðanarskyldu um útlendskar lutaseðlar sbrt. § 2, 2. pkt. í eydnuspælslógini, sum liggur hjá Løgmansskrivstovuni. Í eydnuspælslógini eru eisini neyvari treytir fyri eydnuspæli og vinningum. Hesi eydnuspøl eru t.d. søla av lutaseðlum, skava og vinn seðlar, bingo, tombola, eydnuhjól o.líkn.

Harafturat er løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 26. mai 2010. Hendan lógin heimilar í § 8, stk. 1 kringvarpinum at skipa fyri inntøkugevandi eydnuspølum, so sum V4 og Gekk. Sambært § 16, stk. 1 og 2 í kringvarpslógini kann landsstýrismaðurin í mentamálum saman við einum sendiloyvi eisini geva persónum og feløgum loyvi til at skipa fyri eydnuspølum.

Løgtingslóg nr. 49 frá 15. juni 1950 um føroyskan happadrátt fór úr gildi 1. januar 2011.

4. Stuttur samandráttur av nýskipanini

Alt útlendskt spæl í Føroyum verður skipað gjøgnum Ítróttavedding, sum ger avtalur við útlendsk feløg, sum vilja bjóða út spøl í Føroyum. Alt avlopið hjá Ítróttavedding skal býtast út til almannagagnlig endamál sambært § 9 í lógini so sum til ítróttaendamál, ymisk barna- og ungdómsarbeiði og tiltøk til frama fyri brekað. Á hendan hátt kemur yvirskotið av spæli í Føroyum ymiskum almannagagnligum endamálum her til góðar.

5. Hvør hevur ummælt uppskotið og innkomnar hoyringsviðmerkingar

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Ítróttasambandi Føroya, Føroya Ungdómsráð, Ítróttavedding og Fíggjarmálaráðnum.

Viðmerkingarnar frá Sp/f Ítróttavedding, Ítróttasambandi Føroya, Føroya Ungdómsráð eru tiknar til eftirtektar, og uppskotið er tillagað til hesar. Fíggjarmálaráðið hevði ongar viðmerkingar.

Innkomnar hoyringsviðmerkingar:

Ummælini er hjáløgd sum skjal nr. 1 og 2.

Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

1. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunu

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunu.

2. Mettar umsitingarligar avleiðingarnar fyri land og kommunu

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingarnar fyri land og kommunu.

3. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki nakrar fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki nakrar avleiðingar fyri umhvørvið.

5. Serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur við sær nakað meira av umsiting fyri Ítróttavedding, ið skal gera avtalur við spælifeløg. Uppskotið hevur ikki nakrar serligar umsitingarligar, fíggjarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

6. Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið kann hava við sær, at Ítróttavedding kann fáa størri avlop, sum kann brúkast til at stuðla almannagagnligum endamálum. Av tí at talan er um at bjóða út spøl er altíð vandi fyri, at onkur gerst bundin av spæli við teimum óhepnu avleiðingum, sum hetta kann hava við sær.

7. Hava millumtjóða sáttmálar við sær fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna.

Nei, á hesum øki eru ikki millumtjóða sáttmálar, sum hava nakrar slíkar avleiðingar við sær.

8. Áleggur uppskotið fólki skyldur t.d. upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi skal verða greitt frá umsitingarligu avleiðingunum av hesum.

Nei ongar skyldur verða lagdar á fólk við hesum uppskotinum.

9. Verða heimildir lagdar til annan landsstýrismann, ella til kommunur útyvir kommunustýrislógina, skal greiðast frá teimum fyrilitum, ið grundgeva hetta.

Ongar slíkar heimildir verða latnar sambært uppskotinum.

10. Fáa almennir myndugleikar atgongd til privata ogn, skal grundgevast fyri hesum og greiðast frá vavinum av heimildini.

Ongar slíkar ásetingar eru í uppskotinum.

11. Skema

	Fyri landið /landsmyndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar /felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar /búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Ja	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða reglur og avtalur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Sosialar avleiðingar				Ja	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1.

§ 1, nr. 1 – 6 og nr. 8

Tá lógin varð samtykt í 2011, var tað ikki ætlanin, at útlendsk spælifeløg sum bjóða út eydnuspøl, happadrátt og klassalottarí, ikki skuldu vera fevnd av lógini. Hugsað varð ikki um at hesi spølini ikki vóru fevnd av orðingini í lógini "veddingar, talspøl og netspøl", ið eru tey spøl, ið Ítróttavedding í dag hevur heimild at gera avtalur um.

Í dag er tí ongin heimild at loyva slíkum útlendskum spølum í Føroyum. Ítróttavedding ger frammanundan avtalur við útlendsk veddingarfeløg um spøl, og tað er tí væl hóskandi eisini at loyva Ítróttavedding at gera avtalur við útlendsk spælifeløg um eydnuspøl og happadrátt. Og avlopið av hesum spølum fer tá eisini til almannagagnlig endamál í Føroyum.

Eyðkennið fyri veddingar, talspøl og netspøl (hasardspøl) o.líkn. er, at úrslitið er tilvildarligt og ikki at rokna út frammanundan og er ikki tengt at dugnaskapi og royndum hjá spælara. Ofta er talan um skjót spøl, har vinningur ella tap verður staðfest næstan beinanvegin. Talan er um spæl við stórum peningaumsetningi.

Eyðkennið fyri eydnuspæl og happadrátt er, at ein vinningur verður drigin fyri hvørt spælið, og at tað tí altíð er ein vinningur aftaná hvørt spæl, men tað er tilvildarligt og óvist, hvør tað er, sum fær vinningin.

Broytingarnar geva Ítróttavedding heimild at gera avtalu við útlendsk eydnuspælsfeløg um at bjóða út eydnuspøl, so sum happadrátt, í Føroyum.

Viðvíkjandi broyting nr. 1 verður annars víst til pkt. 3 í almennu viðmerkingunum um galdandi lóggávu í Føroyum

§ 1, nr. 7

Tá Ítróttavedding ger avtalur við veddingarfeløg, verður kravt eitt gjald fyri at sleppa á føroyska marknaðin , eitt sokallað "signing fee" gjald umframt eitt loypandi árligt loyvisgjald. Hetta er óbeinleiðis heimilað við, at Ítróttavedding er heimilað at gera avtalur við veddingarfyritøkur. Tað verður mett at vera rættast at staðfesta hesa heimild beinleiðis í lógini.

§ 1, nr. 9

Í dag skal gjaldast eitt avgjald til Ítróttavedding á 15% av øllum vinningum oman fyri 200 kr.

Í veddingarspølum og kasinospøl á netinum (on line spøl) sum t.d. poker og roulette verður í sama spæli vunnið ella tapt fleiri ferð, tí hvørt einstakt spæl er sera stutt. Um fólk t.d. spæla 1 spæl av poker í 1 tíma, so inniheldur hetta spælið eina rúgvu av part-spølum, har annaðhvørt verður vunnið ella tapt. Eftir ásetingini í dag, so skal avgjald gjaldast av hvørjum av hesum part-spølum, um vinningurin er oman fyri 200 kr. Hetta letur seg í royndum ikki gera, og tí verður skotið upp, at fyri hesi spølini skal í staðin verða kravt eitt avgjald, sum er 15% av bruttospæliinntøkuni hjá veddingarfelagnum.

Bruttospæliinntøkan er tað, sum loypur av, tá útgoldnu vinningarnir eru farnir av tí, sum samlað er komið inn av spælipeningi.

Til § 2, stk. 1

Gildiskomuregla um, at lógin kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Til § 2, stk. 2

Stk. 2 er ein yvirgangsregla. Eydnuspælsfeløg úr m.a. Íslandi og Týsklandi hava virkað í Føroyum í longri tíð uttan at hava loyvi til tess eftir løgtingslóg um eydnuspøl ella løgtingslóg um kringvarp. Við hesi yvirgangsreglu verður givið hesum feløgum freist til tann 31. desember 2014 at fáa gjørt eina avtalu við Ítróttavedding, um tey ynskja at halda fram við teirra virksemi í Føroyum.

Løgtingsskrivstovan, 28. februar 2014

Kaj Leo Holm Johannesen,
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir

Viðløgd skjøl:

Skjal 1: Hoyringssvar frá Sp/f Ítróttavedding, Ítróttasambandi Føroya, Føroya Ungdómsráð.
Skjal 2: Hoyringssvar frá Fíggjarmálaráðnum